# Mjølnir kom á talvuna

**Vágaliðini halda fast um oddastøðuna, hóast tey ikki spældu hetta vikuskiftið**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Tað var sjón fyri søgn, at mest sum klassiska uppgerðin millum TB og Mjølnir ikki longur er tann sama, sum hon hevur verið*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

Tað er mest sum tann umvenda verð í føroyskum kvinnuflogbólti. Higartil í ár hava tey bæði vágaliðini, Dráttur og SÍ, skúmað avstað við fullari ferð, og tó at tey ikki spældu hetta vikuskiftið, so halda tey enn fast um oddasessirnar.

Hetta høvið nýtti TB til at troka seg fram á talvuni, soleiðis at tær nú eru fremtsu avbjóðararnir hjá teimum báðum fremstu liðunum. TB hevði vitjan av Mjølni, og her sást sjón fyri søgn, at Mjølnir í løtuni ikki eru tað, sum tær áður hava verið. Nýtt fólk verður nú sett við á liðnum, sum hevur vunnið so nógv gjøgnum árini, og tí eru boðini heilt greitt, at enn skal ikki roknast við tí heilt stóra.

Mjølnir kom tó eisini á talvuna, tá tær um vikuskiftið høvdu vitjan av KÍF. Talan var fyri tað nógva um ein sera spennandi dyst, men eftir at Mjølnir tók sera spennandi triða settið, tóktust gestirnir at knekka.

Og heldur ikki í Fuglafirði fekk KÍF nakað burturúr. Her var annars enn tættari, tí dysturin mátti út í fimm sett, áðrenn ein avgerð varð funnin. Men eins og í Klaksvík, so stóð avrikið hjá KÍF ikki mát, tá seinastu settini komu.

Fjórða settið vann ÍF sera greitt, og tó at KÍF aftur spraklaði nakað í seinasta settinum, so var hetta ov lítið, til at tað veruliga munaði.

# Fleyr streyk í oddin

**Við tryggum sigri á ÍF hildu menninir hjá Fleyr fast um oddasessin í bestu mansdeildini**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað líkist longu nú einum tvídysti millum Fleyr og SÍ í toppinum av føroyskum mansflogbólti.

Um vikuskiftið hevði Fleyr eitt slag av styrkisroynd, tá teir vitjaðu hjá ÍF, og hendan dystin tóku gestirnir uttan stórvegis hóvasták. Eina løtu royndu fuglfirðingarnir tó at trýsta, og teir vunnu eisini næsta settið, men talan gjørdist to ikki um meira enn tað sama.

Samstundis spældi hitt oddaliðið, SÍ, útidyst móti Nøvuni, og tað gav ikki nakrar serligar trupulleikar. Nøvan roynir seg í vetur fyri fyrstu ferð í meistaradeildini, og sum teir sjálvir taka til, so er setningurin fyrst og fremst at taka við læru hetta árið.

Og tað var eisini setningurin, tá teir spældu á Kambsdali móti ÍF. Her vann heimaliðið ein tryggan sigur, soleiðis at eisini teir komu á stigatalvuna, har Mjølnir og Nøvan í løtuni eru aftastu sessunum.

# Battini sveiggja aftur

**Um vikuskiftið varð hol sett á Grand-Prix kappingina í borðtennis. Kappast varð í høllini í Trongisvági, har eini 70 spælarar kappaðust í 10 ymiskum bólkum.**

**Bólkavinnararnir gjørdist hesir:**

| | |
|---|---|
| **A** | Ragnar Egilsson, Tór |
| **B** | Pætur Albinus, Tór |
| **C** | Hanus Stórhamar, TBF |
| **D** | Jónhard Ferjá, TBF |
| **E** | Heini Mortensen, TBF |
| **F** | Rasmus Potts, TBF |
| **G** | Patrikk Johannesen, TBF |
| **H** | Birita Mortensen, TBF |
| **I** | Femja Mortensen, TBF |
| **J** | Sára Hentze, TBF |

Støðan eftir 1. Grand Prix umfarð er hendan:

**Smápinkur:**
1. Anna Mikkjalsdóttur, TBF 86 stig
2. Eva Wilhelm, TBF 78 stig
3. Sofía Maria Ferjá, TBF 70 stig

**Smápiltar:**
1. Hans Jón Jacobsen, TBF 76 stig
2. Eyðfinnur Jensen, TBF 74 stig
3. David Mortensen, TBF 62 stig

**Pinkur:**
1. Birita Mortensen, TBF 88 stig
2. Súsanna Bærensen, TBF 80 stig
3. Femja Mortensen, TBF 78 stig

**Piltar:**
1. Rasmus Potts, TBF 170 stig
2. Heini Mortensen, TBF 160 stig
3. Patrikk Johannesen, TBF 110 stig



*Hjá pinkunum er Anna Mikkjalsdóttir í løtuni fremsti spælarin við 86 stigum*

**Smágentur:**
1. Rakul Mikkjalsdóttur, TBF 270 stig

**Smádreingir:**
1. Gilli Sørensen, TBF 380 stig
2. Fróði Jensen, TBF 360 stig
3. Hugin Albinus, TBF 320 stig

**Gentur:**
1. Susie Midjord, TBF 310 stig
2. Joan Thomasen, TBF 240 stig
3. Svanna Mortensen, TBF 150

**Dreingir:**
1. Reidar Luid, Tór 450 stig
2. Pætur Albinus, Tór 400 stig
3. Sjúrður Ferjá, TBF 350 stig

**Kvinnuunglingar:**
1. Marin í Dali, TBF 410 stig
2. Mariann Mikkjalsd., TBF 290 stig
3. Eydna Jespersen, TBF 230 stig

**Mansunglingar:**
1. Ragnar Egilsson, Tór 500 stig
2. Sigurð Carlsson, Tór 430 stig
3. Levi Winther, Tór 220 stig

**Meistaradeildin:**
1. Fríði Jensen, TBF 470 stig
2. Vagnur Nolsøe, TBF 400 stig
3. Ragnar Nolsøe, TBF 390 stig

**Flogbóltsúrslit - Meistaradeild kvinnur**
Mjølnir-KÍF 3-1 (23-25, 25-19, 25-23, 25-16)
TB-Mjølnir 3-0 (25-14, 25-20, 25-16)
ÍF-KÍF 3-2 (25-19, 22-25, 19-25, 25-12, 15-10)

**Meistaradeild, menn**
ÍF-Fleyr 1-3 (11-25, 25-22, 18-25, 18-25)
Nøvan-SÍ 0-3 (17-25, 15-25, 22-25)
ÍF-Nøvan 3-0 (25-15, 25-17, 25-19)

**Hondbóltsstøður - Sunset-kappingin**

SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

| | dystir | v - j - t | v. mál | t. mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 4 | 4 - 0 - 0 | 117 | 63 | 54 | 8 |
| 2 Neistin | 5 | 4 - 0 - 1 | 134 | 98 | 36 | 8 |
| 3 Kyndil | 6 | 4 - 0 - 2 | 133 | 133 | 0 | 8 |
| 4 VB | 3 | 2 - 0 - 1 | 73 | 56 | 17 | 4 |
| 5 VÍF | 5 | 2 - 0 - 3 | 122 | 111 | 11 | 4 |
| 6 StÍF | 5 | 2 - 0 - 3 | 110 | 119 | -9 | 4 |
| 7 Søljan | 5 | 1 - 0 - 4 | 92 | 130 | -38 | 2 |
| 8 Tjaldur | 5 | 0 - 0 - 5 | 71 | 142 | -71 | 0 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN
MENN

| | dystir | v - j - t | v. mál | t. mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 5 | 4 - 1 - 0 | 141 | 122 | 19 | 9 |
| 2 H71 | 5 | 3 - 1 - 1 | 152 | 122 | 30 | 7 |
| 3 VÍF | 5 | 3 - 0 - 2 | 147 | 144 | 3 | 6 |
| 4 StÍF | 5 | 2 - 0 - 3 | 117 | 133 | -16 | 4 |
| 5 Neistin | 5 | 1 - 0 - 4 | 134 | 150 | -16 | 2 |
| 6 KÍF | 5 | 1 - 0 - 4 | 120 | 140 | -20 | 2 |

**Flogbóltsstøður - Meistaradeild, kvinnur**

| | dystir | v - j | v. mál | t. mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Dráttur | 3 | 3 - 0 | 9 | 1 | 8 | 6 |
| 2 SÍ | 2 | 2 - 0 | 6 | 2 | 4 | 4 |
| 3 TB | 3 | 2 - 1 | 6 | 3 | 3 | 4 |
| 4 ÍF | 3 | 1 - 2 | 5 | 8 | -3 | 2 |
| 5 Mjølnir | 3 | 1 - 2 | 3 | 7 | -4 | 2 |
| 6 KÍF | 4 | 0 - 4 | 4 | 12 | -8 | 0 |

**Meistaradeild, menn**

| | dystir | v - j | v. mál | t. mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fleyr | 3 | 3 - 0 | 9 | 1 | 8 | 6 |
| 2 SÍ | 2 | 2 - 0 | 6 | 1 | 5 | 4 |
| 3 ÍF | 3 | 1 - 2 | 5 | 6 | -1 | 2 |
| 4 Mjølnir | 1 | 0 - 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| 5 Nøvan | 3 | 0 - 3 | 0 | 9 | -9 | 0 |